## Lena um fastfood

Ein partur av at ferðast nógv við tónleiki er, at tú hevur ikki altíð tíð og umstøður at gera tær ein góðan og sunnan døgurða. Tí verður tað javnan til fastfood, tá ið vit eru á ferð. Seint á kvøldi, eftir eina konsert, sigi eg bara takk fyri Seven-Eleven og rock n' roll.



## Lena um nýggju fløguna

Eg eri glað fyri nýggju fløguna, og eg eri nøgd við sangirnar. Eg fari ikki at siga, at hetta er rocket science, men hetta eru nakrir sangir, sum vit hava skrivað, og sum vit hava valt at framleiða á hendan hátt. Hetta vísir, hvar vit eru júst nú.

# g at siga takk



***- Vit hava øll nøkur arr, sum vit stríðast við. Summi hava havt vánaligar upplivingar í barndóminum, onnur hava verið fyri keðiligum hendingum, og soleiðis er hjá okkum øllum. Tað er tó umráðandi, at vit ikki lata hesi arr køva okkum alt lívið, sigur Lena Anderssen. Mynd: Bárður***

gjørt meg til tann persónin, sum eg eri í dag, sigur Lena Anderssen.

### Pallurin er nakað serligt

Ein týðandi partur av lívinum hjá Lenu Anderssen er at fara á pallin og framføra sínar sangir fyri fólki.

- Mær dámar sera væl at spæla til konsertir. Onkuntíð kann eg gerast nervøs áðrenn eina konsert, men eg royni altíð at hugsa positivt. Tað er sum hjá einum fótbóltsspælara, sum skal spæla ein dyst. Hann skal tveita alt óneyðugt burtur og gera seg mentalt kláran at fara á vøllin.

- Sum tónleikari kanst tú hava góðar dagar, vanligar dagar og minni góðar dagar, men tað er altíð eitt gott upplivilsi at verða á pallinum.

- Ein partur av at verða kreativur er at vísa úrslitið av tínum arbeiði fyri fólki. Børn, sum hava teknað okkurt í einum barnagarði, vilja gjarna vísa foreldrunum tekningina, og tónleikarar, sum hava skrivað sangir, vilja gjarna spæla teir fyri fólki. Sum barn ella sum tónleikari hevur tú brúk fyri at verða bekreftaður, og tú vilt gjarna deilda tað, sum tú hevur skapt, við onnur fólk, sigur Lena Anderssen.